# 2005

## ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR




# ÍF – B36

**FORMULADEILDIN**

**Mánadagin 27. juni 2005 Kl. 19.00 í Fuglafirði**


HAVSBRÚN

formuladeildin

TOYOTA MIKLAGARÐUR P/F Petur Larsen

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel 444636 / 228771
Fax 444634
www.if.fo
if@if.fo

**Leikskrá 6 2005**

**Útgevari:**
**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**ÍF-stuðlar**

**Ábyrgd**
ÍF-stuðlar

**Blaðnevnd**
ÍF-stuðlar

**Myndir**
Rógvi Róin
Sosialurin

**Kápumynd**
Ingi og Símun dystast um bóltin. Myndin er frá dystinum móti B36 í Fuglafirði 10. apríl
*Mynd: Álvur Haraldsen Sosialurin*

**Prent**
Estra

**Uppseting**
Sisero 351800

**TAÐ HALDA VIT**

# FEPUR ER SJÁLVDAN NAKAÐ MANN YNSKIR SÆR!

Fepur er sjálvdan nakað mann ynskir sær! Á fótbóltsprátið er øðrvísi, tí fótbóltsfepur boðar frá góðum. Tað kunnu vit fuglfirðingar eisini skrivað undir uppá. Fepurin, sum rakti Fuglafjørð sum eitt skot tíðliga í ár, og flestu fuglfirðingar vórðu raktir av, merktiskt. Bygdin var á gosi, og øll tosaðu um fótbólt. ÍF, ÍF og aftur ÍF. Tíverri er fepurin minkaður nógv síðsta hálvannan mánaðin, og nú eru tað nærum bara teir størstu fótbólts-entusiastarnir, sum hava eitt sindur av fepuri. Teir hava ilt við at sleppa av við hann, tí teir brenna fyri tí; líkamikið úrslitini á vøllinum.

Nógvu vánaligu úrslitini seinastu tíðini hava havt við sær, at áhugin fyri besta liðnu mikar, og áskoðararnir gerast færri. Hetta er náttúrligt. Samstundis hevur nærum, hvør maður (og fótbóltsáhugað kvinna) eina meining um, hvat ÁTTI at verið gjørt og hvat EIGUR at verða gjørt. -Leikararnir geva seg ikki 100% í dystunum, venjararnir megna ikki at seta leikararnar upp; ja soleiðis gongur prátið millum mannað. Frælsi at tala og hava eina meingin er eisini nátúrligt; eisini sum áskoðari. Fólk eru eisini farin at tosa um, at hópurin ikki er breiður nokk, og vit áttu fingið fleiri leikarar í hópin. –Tey nevna handan og handan leikaran, tí hann og hann er "ledigir". -Hetta er kanska partvís rætt. –Hópurin er nokk ikki breiður nokk at klára 27 dystir! Vit í ÍF-stuðlum, sum eru serliga tætt knýttir at 1. deildarhópinum, hava í samráð við venjarar og nevnd fingið fleiri leikarar til felagið. Eisini royna vit at gera alt fyri, at umstøðurnar kring liðið eru optimalar. –Alt hetta er sera kostnaðarmikið, og tí skal eisini ein ávísur innsatsur gerast uttanfyri vøllin. Higartil hevur tað eydnast, og vit gjalda, hvørjum sítt. –Vit vildu ynskt, at hópurin varð breiðari, og vit kundu hjálpt til við hesum. Í verandi støðu seta vit okkum ikki førar fyri at fáa fatur á fleiri leikarum til hópin, tí veruleikin er tann, at eingin leikari kemur ÓKEYPIS til nakað felag í Føroyum; og so slettis ikki til eitt, sum

**Framhald á s. 32**



**DYSTURIN Í DAG**

# Í DAG VERÐUR TAÐ DREINGIR!

Hetta er aðru ferð í ár, at árstalsfelagið úr Havn vitjar okkum í landskappingini í ár. Hetta kemst av tí, at kappingin er broytt, soleiðis at liðini í ár leika 3 dystir móti hvørjum øðrum. Í sambandi við dystin seinast skrivaðu vit, at tað ikki hevði gingið eftir vild fyrstu dystirnar, meðan tað hjá okkum hevði gingið sum eftir ánni. Vit skuldu nokk havt gjørt minni burtur úr, tí síðani tá er vent í holuni. B36 vann sín fyrsta dyst í ár tann dagin í Fuglafirði, og vit taptu tann fyrsta. Og síðani tá hava teir ikki tapt, meðan vit næstan ikki hava gjørt annað. Teir hava vunnið sær 22 stig, meðan vit bara hava fingið 6 stig síðani lagnudagin; og eitt pláss í hálvfinaluni um Løgmanssteypið.

Í dystinum ímóti Skála næst síðsta vikuskiftið vístu okkara leikarar sera góðan hugburð. Teir drivu á allan dystin, og um eydnan var við okkum, kundu vit enntá avgjørt til okkara fyrimun. Hinvegin varð innsatsurin í Vági síðsta sunnudag ikki góður, og úrslitið eisini hareftir. Tí ræður um í dag hjá venjarunum báðum, at fáa sett menn upp til dystin, soleiðs at menn geva seg allar 90 minuttirnar.

Vit vita at Sigfríður er ein góður taktikari, og tað vísti eisini seinast vit leiktu ímóti B36. Uppleggið var rímuliga einfalt. –At spæla kontant – til tíðir var tað eisini ófantaliga kontant, og tá dómarin Páll Augustinussen ikki hevði tamarhald á, gjørdu menn (eisini okkara) sær dælt av hesum – og verða á okkara monnum alla tíðina og ikki minst, spældi Fróði Benjaminsen sum ein brandur á óvana plássinum í verjuni.. Hetta eydnaðist til fulnar, og vunnu teir hvítu dystin 0-2. Uppskriftin hjá Sigfríða verður helst tann sama sum seinast. –Munurin í dag er m.a. tann, at miðvallageneralurin, Ingi Højgaard er leikbannaður og er tí ikki við í dag.

Allir leikararnir hjá okkum eru tøkir til dystin í dag. Ein skaði forðaði Gunnari at verða við í móti VB í Vági síðstu vikuskifitð, men Gunnar er helst tøkur til dystin í dag. Tað er eingin ivi, at hann er ein sera týðandi leikari fyri liðið, og man helst verða ein av bestu álopskendu miðvallaleikarunum í landinum. Um Gunnar er klárur til dystin verður hann uttan iva á álopskenda miðvallarplássinum. Hvør so fer á beinkin kunnu vit bara gita um. Nýggi málverjin hjá okkum, Tórður, fær nokk "debut" í dag. Hann hevur vant sera væl síðani hann kom fyri seg eftir sjúku. So nú hava vit tveir málverjar, sum kappast um tað eina plássið, og tað ger ikki málverjarnar ella liðið verri.

Vit kunnu skriva upp og niður um uppstilling, taktikk og annað, men tað eru bara leikararnir sjálvir, sum kunnu gera nakað. Og fara teir inn á vøllin í dag vit rætta hugburðinum, vinna vit dystin í dag!

Rustviðgerð ella forrútar

vit hava loysnina

BE AUTOGLAS

Í Brekkum 1
530 Fuglafjørður
tel. 444 215
fax 444 813
fartel. 220 876






FONN FLOG

FO-700 Klaksvík · Tel 456363 · FO-600 Saltangará · Tel 474800
fonnflog@fonnflog.fo · www.fonnflog.fo



GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71



FARPACK

Staravegur 5 • P.O.Box 3099 • FO-110 Tórshavn
Telefon 353000 • Fax 53010
www.farpack.com • e-mail: farpack@farpack.com




HÓPURIN

# JONN FINGIÐ GÓÐ BOÐ!

Fyri góðari viku síðani varð Jonn lagdur undir skurð, tí skaðin hann fekk ímóti HB herfyri vísti seg at verða somikið stórur, at hann hevur forða Jonn at verið aftur á vøllinum. Tað vísti seg, at kross-liðbandið varð forstrekt, samstundis sum knæið hevði fingið onkran annan snudd eisini. Hetta merkir at Jonn kann fara fara undir uppvenjing beinanvegin, og tað er hann eisini farin. Hann hevur fingið at vita, at tað tekur einar vikur at venja upp aftur. Sjálvur vónar og væntar Jonn, at hann verður klárur til 2. hálvfinaluna ímóti B68 sunnudagin 24. juli á Toftum. Jonn sigur, at frá læknunum hevur hann fingið at vita, at verður hansara kross-liðbandsskaði samanborin við ein eitt slitið krossband, er hann á viku 15 í uppvenjingini, sum tekur umleið 20-30 vikur hjá einum sum hevur slitið krossbandið.

**Julian slitið krossbandið**

Seinasta dømi um, at ein slíkur smeitur, sum Jonn fekk, kann endað galið, er landsliðleikari okkara og spælandi venjarin hjá toftamonnum, Julian Jonsson. Í gjár 23. juli fekk hann nevnliga staðfest, at kross-liðbandið er slitið. Vit hava loyvi okkum at prentað brot úr grein á heimasíðuni hjá B68: "Spælandi B68-venjarin spælir ikki meira í ár. Tað er greitt eftir at Julian Johnsson í gjár varð kannaður hjá serlækna í Danmark. Hesin staðfesti, at Julian hevur slitið krossbandið og harafturat er okkurt liðband toygnað. Støða er tikin til, at hann verður lagdur undir skurð komandi hósdag. Og talan er um eina stóra skurðviðgerð, ið tekur fleiri tímar.

Hetta merkir, at Julian spælir ikki aftur í hesum kappingarárinum, tí tá krossbandið er farið, krevst drúgv venjing eftir skurðviðgerð.

Tey gleðiligu tíðindini í øllum hesum eru tó, at danski serlæknin hevur givið sítt orð uppá, at við miðvísari venjing kemur Julian at spæla aftur næsta ár. Og sum tann stríðsmaður hann er, er Julian sinnaður at gera alt fyri at koma fyri seg aftur sum fótbóltsspælari. B68-formaðurin Niclas Davidsen upplýsir fyri



heimasíðuni, at sjálvt um Julian er liðugur sum fótbóltsspælari í ár er greitt, at hann heldur fram sum venjari hjá B68 og fer at stýra troppunum av síðulinjuni. Tað er eingin loyna, at Julian hevur verið ein verulig turbo á miðvøllinum hjá B68 í ár" (www.b68.fo)

Út frá hesum skal Jonn og vit ÍF-arar fegnast um, at tað ikki gekk eins illa hjá Jonn sum hjá Julian.

-Tað er eingin loyna, at Jonn spældi sum ein brandur áðrenn hann fekk skaðan, og vit hava harliga brúk fyri honum. Vit ynskja Jonn alt tað besta, samstundis sum vit vóna, at tað eydnast Juliani at koma fyri seg, og framhaldandi verða ein av lyklaleikarunum í føroyskum fótbólti.

Mynd: ***Julian tekur seg um knæið í Leirvík leygardagin. Tað er nú staðfest, at hann hevur slitið korss-liðbandið*** *(Mynd: b68.fo)*

Fuglafjarðar Træsmiðja

Snikkaraarbeiði
- Vindeygu
- Úthurðar
- Trappur
- Umvælingar

Tel: 44 42 34
Tel: 21 42 34
Toftagøta 12
530 Fuglafjørður

Fuglafjarðar Træsmiðja
við Jóhan Larsen

fk
Fuglafjarðar Keypsamtøka
Tel. 444 095 - 444 495 Fax 444 895

FAXE KONDI



## HUGLEIÐINGAR STEINBJØRN Í LAMBANUM SKRIVAR

# FÓTBÓLTUR, FÓTBÓLTUR OG AFTUR FÓTBÓLTUR!

*– geinin er skrivað 9. juni, og skuldi havt verið prentað í síðstu leikskránni, men av misgávum kom hon ikki við*

Nú vit skriva 12. juni, og 12. umfar av landskappingini, Formuladeildin, verður leikt, merkist tað veruliga, at tað eru fleiri dystir enn árini frammanundan. Summarstøðgurin hevur verði, ja, men bert eina viku, so tað er, sum einki at roknað.

Umframt landskappingina, hava tað júst verið 2 landsdystir, so vit áskoðarar hava havt úr at gera. Og tað er munur á at standa á bakkanum ella á hyllini í Fløtugerði, við nervunum hangandi uttaná og heppa sínum liðið, og so at sita á Tórsvølli ella á Svangaskarði, har ein bara vónar tað besta, men innast inni roknar við at Føroyar tapa.

Tað er nakað serligt við landsdystum. Hetta, at tosa um tað nakrar dagar, fylgja við í útvarpinum, hvussu fyrireikingarnar ganga, og so rigga seg til og fara avstað saman við vinum og kenningum. Soleiðis var eisini nú mikukvøldið, tá Føroyar tóku ímóti Írlandi á Tórsvølli, við "kick of" klokkan 19:30.

Longu um fimmtíðina gingu menn og riggaðu til, mettu um veður og vind, funnu fram jakkar og draktir, pengar og atgongumerkir, og ikki at gloyma tað lítla lurtitóli, so ein kundi hoyra Súna Merkistein og teir meðan leikt varð. Jú, slíkar løtur minna ikki sørt um, tá menn rigga til at fara á fjall í ivaveðri.

Teir koma alt ov tíðliga til Havnar, ganga og bíða, eta pilsur og breyð, sjálvt um eingin er svangur, og teir ilskast eins og flestu allir føroyingar yvir, at Todi ikki er við. Í góðari tíð sita teir so har, stoltir og gleðast um, at teir vóru so klókir, at teir longu seinasta summar ognaðu sær atgongumerkir til allar dystirnar, og tí eiga fast pláss á einum góðum stað.

Hvussu gekst við dystinum vita øll. Vit taptu, men tað roknaðu teir eisini við, so tað spilti ikki túrin. Hinvegin hava vit føroyingar nógv at læra, tí tað er altíð okkurt at fýlast á. -Smáting, sum tó arga og ikki eiga at vera. Ofta er tónleikurin í hátalarunum so harður, at fólk sita við fingrunum í oyrunum, men so var ikki henda dagin.

Hesaferð var tað speekarin, sum eingin hoyrdi. Enntá verri, enn tá Dia roynir umvegis teir báðar hátalararnar við vøllin hjá okkum, roynir at upplýsa neyðugu upplýsingarnar til áskoðararnar. Tað tyktist, sum teir høvdu gloymt at skrúva frá, so at kalla einki hoyrdist í hátalaranum, og bert tey, sum lurtaðu í útvarpinum, fingu við, hvussu nógvir áskoðarar vóru. Ein síðumaður spyr: "Er tað eg sum eri deyvur ella ljóðar tað spakuliga?" Hin svarar: "Eg hoyri fínt" — og so verður flent ófrøt. -Søgan um hinar í saltfiskalastini kom fram, tá ein lat lastalúkuna spakuliga aftur, so tað bleiv myrkt, meðan ein annar lempaði salt upp á lívið. Tann triði maðurin, sum einki visti, segði: "Tú lempar so, sært tú nakað? Er tað ikki myrkt?" Tá hin bara fýsur, og biður hann ikki verða so býttan, men arbeiða, verður hann

FRAMHALD Á SÍÐU 7

# ÁSKOÐARIN HESA FERÐ EIVIN BREIÐASKARÐ

**TÙ**
**Navn:** Eivind Sigurd Breiðaskarð
**Føðingardagur:** 18.01.1977
**Starv:** Krambakallur og provianthandlari hjá Haraldsen
**Frítíðarítriv:** Alt sum hevur við fótbólt at gera + tónleikur
**Vónir fyri 2005:** Eg vóni, at vit enda omanfyri GÍ á endaligu stigatalvuni

**FÓTBÓLTUR**
**Hvussu nógvar dystir sært tú um árið:** Alt ov nógvar
**Størsta styrki hjá ÍF liðnum:** Tá ið nr. 12 spælir upp til sítt besta
**Størsti veikleiki hjá ÍF liðnum:** Teir hava ofta trupult við at stýra einum dysti
**Torførasta mótstøðulið:** HB (sjálvandi)
**Minningarríkasti dystur hjá ÍF:** Dysturin heima ímóti B71 í fjørð – sera góður stemningur
**Lýs ÍF-liðið við trimum orðum:** Alt ov torført .. he he
**Um tú skal geva ÍF leikarunum, venjarum og hjálparfólkum góð ráð, hvørji vildu tey verið:** "Havi ikki virðing fyri nøkrum øðrum liði. Allir mugu stríðast fyri sakini, tí hinir eru ikki góðir við okkum. – Kempi kempi kempi.
**Hvat heldur tú um ÍF áskoðararnar:** Teir leypa alt ov skjótt av tokinum, tá ið mótbrekka er
**Hvørji trý lið heldur tú fara at enda ovast í ár:** HB, NSÍ og B36



**TÍNIR FAVORITTAR**
**Besti áskoðari:** Jógvan hjá Annefíu
**Besti fótbóltsleikari í Føroyum:** Andy Olsen, NSÍ
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í Føroyum:** Jákup Mikkelsen, Poul Ennigarð, Janus Joensen, Eyðolvur R. Petersen, Gunnar G. Nielsen, Pætur Dam Jacobsen, Súni Olsen, Jonhard Fredriksberg, Bogi Gregersen, Andy Olsen og heðin á Lakjuni
**Matur og drekka:** Ræst kjøt og ein køld øl
**Besta árið og hví: 1977:** Liverpool sat ovast á fótbóltstrúnuni í Europa, og so bleiv eg eisini føddur
**Slag av tónleiki:** Alt uttan klassiskt
**Besta sending í SvF:** Alt hjá Zacharis Hammer
**Besti filmur:** Million dollar baby
**At slappa av:** Ein góður fótbóltsdystur í sjónvarpinum

**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Diego Maradona – eingin tekur hann
**Stuttligasi persónur:** Signar Poulsen og Jim Carrey
**Sjónvarp/filmstjørna:** Jim Carrey og Jack Niocholsen
**Sangari/sangarinna:** Bono go Celine Dion
**Besta bók/blað:** Jumbo-bøkurnar hjá Anders And

At enda vil eg bera hesa heilsu:
*Eg vil hervið takka ÍF-stuðlum fyri tað ótrúðiliga arbeiði, ið teir/tey hava lagt í lið okkara hesi seinastu árini. Takk fyri.*












KJ er ein fjølbroytt fyritøka, sum veitir útgerð, eykalutir og tænastur til fiskivinnuna, alivinnuna, flutningsvinnuna og entreprenørvinnuna. Í okkara úrvali av útgerð finst m.a. trolspøl, kranaspøl, marinekranar, lastbilakranar og gravimaskinur. Í okkara stóru eykalutagoymslu hava vit hydraulikkfittings, slangur, rør, pumpur, motorar, ventilar, koblingar, tetningsringar o.m.a.





- Spøl
- Kranar
- Hydraulikklutir
- Filtur
- Aliútgerð
- Katamaranar

KJ HYDRAULIK
POWER & MOTION CONTROL

P.O. Box 110 á Kambsdalur · Tel +298 444 170 · Fax +298 444 265 · info@kj-hydraulik.com · www.kj-hydraulik.com




Landsins **størsta** og besta úrval





gravering íroknað prísin

EA EILIF ARGE
Tel. 455164 · Fax 457576



**PLÁTUVERKSTAÐIÐ**
v/ Glenn Perdomo

Undir Krákugjógv 5 Kj.,
Tórshavn tel 321778

**KUNNINGARSTOVAN Í FUGLAFIRÐI**
INFORMATION OFFICE

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |

FO-530 Fuglafjørður
Tlf. (+298) 44 48 60 - Fax (+298) 44 51 80
t-post: infoey-f@post.olivant.fo

**FUGLAFJARÐAR BÓKASAVN**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 44 47 45 - Fax 44 51 80
t-post: bokasavn@atlantic.fo

*Opið:*

| | |
|---|---|
| *Mánadag - fríggjadag* | *kl. 9-12 og 13-17* |
| *Leygardag* | *kl. 9-12* |




Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn,
Tel 345600, Faks 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

formuladeildin



í altjóða kapping....

formula.fo

HAVSBRÚN

Tel. 41 44 00 • Fax 41 44 01 • havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo

Lastvognskoyring



Øll lastvognskoyring verður gjørd

Kári Zachariassen

530 Fuglafjørður
tel 444 245 ella 217 245

BERGFROST
COLD STORAGE

P. O. Box 85
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
www.bergfrost.com

Tel +298 44 46 11
Fax +298 44 46 07
Mobile +298 22 36 67
bergfrost@bergfrost.com



# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttura og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala

**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar Kommuna**
P.O. Boks 30 · tel. 444006 · fax 444657
fko@fuglakomm.fo
www.fuglakomm.fo



**Rasmus Joensen**

Málarameistari

530 Fuglafjørður

Tel. 444 139 - 214139

**SANDGREVSTUR P/F**
Norður í Gerði 7
530 Fuglafjørður

Stovnað 1949 - reiðarí innan frakt- & sandbátar

- Norskur stoypisandur
- Hvítur stoypiskervur
- Hvítur skervur til tún
- Reyður skervur til tún
- Fø. stoypi- og pussisandur
- Rall
- Sandblásisandur
- Betongflísar

Koyring við kranalastvognum
fyri fastar prísir (eisini til Tórshavnar)

tel 444121 • 595900 • 595910



Tannlæknastovan

Steintór Larsen | tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge | tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 | 530 Fuglafjørður | tel. 444 358






**Fysioterapiviðgerðarstova**

Ítróttarhjálparútgerð við lágum prísum: t.d. tape, eingangs ís-posar og 1. hjálpar-/ "læknataskur"

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur







**LEVI'S® RED TAB® JEANS**



Klæði til hennara,
hansara og børnini
- nu lat undir somu lon

**VØRDSLAN WEARHOUSE**

Í Støð 6, Fuglafjørður, tel 44 47 47

AVENSIS

TOYOTA



**Avensis**
Einastandandi dygd og koyrigleði.

Vegurin Langi · Hoyvík · Tel. 353040 · Fax 353041
rs@reyniservice.fo · www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE P/F**

VR BILAR
VOLVO
RENAULT







Teir nýggju Volvo S40 og V50
Prísir úr **276.000**

**VR-Bilar**

Hoyvíksvegur 61
FO-100 Tórshavn
tel 32 21 10
telefax 32 21 11
vr-bilar@vr-bilar.fo

Vit umboða eisini Volvo lastbilar, bussar og entreprenørmaskinur

**Opið er soleiðis:**
mánadag til fríggjadag: 08.00-17.00







Eftir dystin bjóðar Shell ókeypis Slush-ice til børnini!
SLUSH-ICE
Vitjið okkum frá kl. 16.30 - 18.00
Tilboðið er galdandi hvønn sunnudag ímeðan kappingin er í gongd
www.shell.fo
Shell-støðin í Gøtudali


AP BUSSKOYRING
V/ Andreas Poulsen
fartel 505220 • 441720


Piddasahandil og Ribarhús
listaframsýningar
heimavirkaðir prýðis- og brúkslutir
føroyskt - »bundið og tøvt« í meturmál
føroyskar fløgur
loppumarknaður
- og altíð ein kaffimuður við »heimabakaðum«
opið er: mán. - frí. 15.00 - 17.30
ley. 11.00 - 13.00
annars eftir avtalu á tlf. 44 44 27
hugnaligt og kveikjandi umhvørvið mitt í býnum í Fuglafirði




Alt innan bátaútgerð
VOLVO PENTA
GPS-plottarar og sjálvstýrarar frá
Cetrek
Bátatænastan
Gríms Kambansgøta 4 • Postsmoga 101 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 17 35 • Fax 31 38 35 • e-mail: batataen@post.olivant.fo
www.batataenastan.fo


Góðskan á arbeiðnum altavgerandi
Nýbygging
Umvæling
Ráðgeving
Tekningar
Kostnaðarmetingar
JLJ-Bygging
Verkfrøði og húsasmíð
690 Oyndarfjørður | tel 21 47 87 & 44 47 87 | t-postur: jljuul@post.olivant.fo





Persónsvognur úr kr. **313.291,-** v. mvg
Vøruvognur úr kr. **247.571,-** v. mvg

Skaðaumvæling av øllum bilsløgum
á Hjalla FO-180 Hoyvík Tel 311013 www.kollsker.com

**Bilverkstaðið**
**v/ Hans J. Kollsker**

Vit hava stórt úrval av gløsum, serviettum, dúkum, ljósum og einnýtisborðbúnaði.
Ert tú í iva um mongd, lit ella støðd, ráðgeva vit tær fegin. Vit taka óásettar pakkar aftur.

*Brúðleyp Dóp Veitslu*
*Merkisdag Meistaraheit*



th-dam@post.olivant.fo

Thomas Dam á Hálsi
HÚSGØGN · LEIKUR · NÁTTÚRUDEILD · HEILSØLA
HEYKAVEGUR 3 · TLF. 31 14 00



Jørleif Petersen
*málarameistari*
Fuglafjørður
tel. 444 395 fartel. 214 395

Alt málaraarbeiði verður gjørt!







Sp/f **Jan Mohr**
**Byggivirkið**

**Tlf: 21 99 49 • 21 89 49**



Hugsar tú um at byggja?
Tosa fyrst við okkum!
Her fært tú altíð eitt gott tilboð
Element-& Betongvøruvirkið
við Gjógv
Tlf. 423173-445173




døgg
.alt innan nýmótans hárviðgerð.
Halla Olsen
tlf. 219379
tlf. 445550
opið er:
mán - frí 10 - 17
hósdag 10 - 19
leygardag 10 - 14
Toftavegur 1 - 530 Fuglafjørður - tlf. 44 55 50




Jolly®




Hugsa tygum um
útskifting ella nýbygging?
- royn okkum!
Vel snið, træsort og viðgerð
Send okkum uppskot
og vit geva tilboð
innan allar seruppgávur
Handverkið ger munin
TRÆSMIÐJAN
317166 GLT
Tórshavn • Tlf. 317166 Faks 318131 • Teldupostur: tra-glt@post.olivant.fo




Hann ger tað ikki lættari at minnast
kotuna á bensinkortinum
Tann nýggi Suzuki Alto
koyrir í meðal 20,4 km.
uppá liturin
SUZUKI
Hann kostar bert:
Kr. 99.990,-
koyriklárur
Suzuki Alto er harafturat fyltur við útgerð so sum powerstýring,
dupult airbags, ABS-bremsum, sentrallás, el-rútum
SUZUKI Berg Motors SUZUKI
Staravegur 1-3, box 1039, 110 Tórshavn - Tlf 313535 Fax 317735

Klaksvíkar Autolakering

BUMSHAMAR • 700 KLAKSVÍK • TLF. 458787 • FART. 223512 & 223513

Timbur-, betong- og jørðarbeiði

**H.K.J. byggivirkið SpF**
Postmoga 40
530 Fuglafjørður
Tel. 21 86 96 og 22 77 99
Fax 44 46 56

# POUL JOENSEN
## LAST & KRANAVOGNSKOYRING

- Last & Kranavognskoyring
- Mini Gravimaskinur
- Mini Lessari
- Útgrevstur við Brøyt
- Betong & Asvaltsaging
- Og mangt annað

Bøvegur 10
530 Fuglafjørður
Tlf: 44 46 42
Mobil: 21 31 95
Fax: 44 42 95





# P/F Petur Larsen
## Mekaniskur verkstaður

postboks 64
530 Fuglafjørður
tel. 444 174
fax 444 285
al@online.fo

BAADER®

fomaco


Saman eru vit tryggari...
ikki bara tryggingar - men eisini trygd
TRYGD


Rokoko
NORÐRAGØTA | TEL 44 10 39


P/f Sveisingahandilin
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 311909


SEND VARM TIL 1441
og vinn hópin av góðum vinningum
10,-
+ SMS TAKST
TVÆR HP - TELDUR
FRÁ COM-DATA
2X
TØM HANDILIN
HJÁ HARALDSEN Í 3. MÍN.*
*) í mesta lagi eitt av hvørjum slag.
NOKIA 6230
FRÁ FØROYA TELE
2XVIÐSKIFTAKORT FRÁ SHELL 2XTELEVARPSMÓTTAKARAR
GÁVUKORT Á 1500 KR. FRÁ TIMBURHANDLINUM Í FUGLAFIRÐI
STEREOANLEGG FRÁ FØROYA KEYPSSAMTØKU
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ PROFA FARVUM Í FUGLAFIRÐI
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ VØRÐSLUNI
GÁVUKORT Á 500 KR. FRÁ KATO
VARMAKELDUSTEVNAN 1.-3. JULI 2005
FØROYA TELE
KATO
HARALDSEN
VØRÐSLAN WEARHOUSE
COM-DATA P/F



Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

**Úrvalsbilar SpF**
v/ Magnus Onghamar

Bakkavegur 530 Fuglafjørður tel 444 943 fax 444 638

**Rasmussen & Weihe P/f**
statsaut. grannskoðarafelag

Heiðavegur • P.O. Box 154 • FO-600 Saltangará
tel 35 17 00 • fax 47 17 01
rasmussen@rasmussen.fo
www.rasmussen.fo

International: An associate firm of **PricewaterhouseCoopers**

**P/F Grannskoðaravirkið**

# INPACT

**Statsaut. revisorar**

**R. C. Effersøesg. 26, Tórshavn**
**Tel +298 31 47 00**
**Fax +298 31 38 15**
**inpact@inpact.fo**
**www.inpact.fo**

**BREYÐMOLIN**
**530 Fuglafjørður • Telefon 444388**



# HER SÆRT TÚ, HVÍ TANN NÝGGI NISSAN ALMERA EITUR DELTA TIL EFTIRNAVN




Bilurin á myndini hevur eykaútgerð. Brennievnisnýtsla við blandaðari koyring: 14,9 km/l, CO2 útlát 160 g/km

**DELTA MERKIR ØKING.** Og tað kann veruliga ikki fáast meiri útgerð í Almera Delta. Hóast hetta kostar Almera Delta 1.8 við 5 hurðum bara **189.000,- kr.**

**3 ára** mekaniskt garanti.
**3 ára** lakk garanti.
**12 ára** garanti ímóti gjøgnumtering

NISSAN

**P/F Meinhardt Arge**
Tel 345400 • www.bilarge.fo

**FRAMHALD FRÁ SÍÐU 2**

liggur í botninum av deildini.

Tí halda vit, at teir persónar, sum hvørja viku og aftaná og áðrenn hvønn dyst, hava eina meining um, hvat skal gerast og hvørjir leikarar skulu keypast, eiga at seta seg í samband við røttu viðkomandi og verða við til at broyta tingini. Tað er nevnliga IKKI BÌLIGT at reka eitt 1. deildarlið, tað skulu tit øll vita. Og heldur man seg ikki til lagda fíggjarætlan endar galið.

Annars mugu tit øll hava ein góðan dyst, og má besta liðið vinna!!

## TÓRÐUR UNDIRSKRIVAÐ SÁTTMÁLA

Í síðstu leikskránni skrivaðu vit um nýggjan málverja, Tórður Thomsen úr NSÍ, sum royndarvandi við okkum, og møguliga skuldi skriva undir sáttmála. Leigusáttmála er undirskrivaður við NSÍ um Tórð, og fyribils hava vit leiga hann til 1. august. Sáttmálin kann leingjast um partarnir eru samdir um tað. Tórður er ein ungur og góður málverji, sum mest sannlíkt skal loysa Jens Martin av í Runavík, tá ið hann gevst at spæla fótbólt. Um hann eisini fer at loysa hann av á landsliðnum er óvist, men evnini hevur Tórður góð, og hevur hann verið á fleiri av ungdómslandsliðunum.

Síðani Jens Martin kom aftur til Runavíkar fyri nøkrum árum síðani, hevur hann m.a. verið málmansvenjari hjá NSÍ. Hann hevur tikið sær av øllum málmonnunum hjá felagnum, og vant teir miðvíst. Tórður er ein av hesum, og meðan vit hava leigað hann, venur hann eisini hjá Jens Martini einaferð um vikuna.

Enn hevur Tórður ikki veruliga fingið roynt seg fyri okkum. –Hann stóð gott nokk í málinum í venjingardystinum ímóti LÍF herfyri, men munurin millum liðini hevði við sær, at hann ongantíð fekk roynt seg. Út frá venjingunum at døma er hann ein sera góður og tryggur málverji. –Hann rópar á viðleikararnar og stýrir teimum, samstundis sum hann er fínur fótbóltsleikari.

Vit ynskja Tórði vælkomnum til Fuglafjarðar og vóna, at hann vísir, hvør dugir er í honum. Tað er eingin ivi um, at tað er framtíð í manninum. Vælkomin!

**FRAMHALD FRÁ SÍÐU 7**

bangin, og heldur seg verða blivnan blindan - starblindan, nakað sum Henrik Larsen, sum ikki tók Toda við.

So kemur hornorkestrið. Duga væl at spæla, men skunda sær so við tjóðsongunum, at ringt er at fáa sangin lidnan líka skjótt sum spælt verður.

Hitt seinasta, sum øll grenjaðu um, er veðrið. Tað sirmaði allan dystin, og tað gjørdi tað næstan bara á Tórsvølli. Alla aðrastaðni, í hvussu so er norðanfyri og eystanfyri var skrótturt, men tað kunnu Poul Michelsen og Tórsvøllur ikki gera so nógv við.

Í dag er so aftur Formula-dystur, og vit halda, at tað er fínt, at dystirnir eru so nógvir. Áskoðararnir standa so her, hvørja ferð, við nervunum uttaná klæðunum og vóna at lið teirra vinnur. Vit halda eisini, at teir eru nógv betur enn skálamenn (og í dag havnarmenn), men hvør vinnur, ja - tað má avgerast á vøllinum. Góðan dyst.





Keyp ein tennisbólt

og tú kanst vinna ein Apex-flogferðaseðil.
Í hálvleikinum skulu bóltarnir tveitast út á vøllin.
Tann bólturin, sum liggur næst miðblettinum,
vinnur Apex-flogferðaseðilin.

Kostnaður 30,-

ATLANTIC AIRWAYS

# ÁRSINS ÍF-ARI 2005

## Allan bestur ímóti Skála



Í móti dystinum móti skálamonnum 12. juni, sum endaði við málleysum javnleiki, valdu áskoðararnir Allan at vera besta leikaran. Tað má siga at verða ein uppreisn fyri Allan, sum m.a. sat á beinkinum í Gøtu vikuskiftið frammanundan. Fyri at verða besti leikarin fær Allan ein sunnudagsdøgurða fyri tvey á Restaurant Muntra.

Tann leikarin, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig. Síðan verður talt saman eftir hvønn dyst og úrslitið sæst í leikskránni til komandi dyst. Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddina í Ítróttarhúsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst.

### Støðan

| Leikari | Seinast | Íalt |
|---|---|---|
| Allan | 39 | 100 |
| Eyðolvur | 34 | 131 |
| Poul | 34 | 69 |
| Bartal | 30 | 60 |
| Símun | 28 | 104 |
| Áki | 22 | 22 |
| Sylla | 19 | 60 |


## VINNINGAR

Ársins ÍF-ari fær 1.000,-
Nr. 2 fær 500,-
Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3

EILIF ARGE

Restaurant Munta letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár

Restaurant Muntra

Tá ið kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Keypssamtøkuni

fk


## ATKVØÐUSEÐIL ÍF-B36, 27. juni 2005

Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hædd í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 minuttir eftir loknan dyst. Besti leikarin verður kunngjørdur í komandi leikskrá

Nr 1 (5 stig) ____________________

Nr 2 (3 stig) ____________________

Nr 3 (2 stig) ____________________

Veljari / tel: ____________________



## STØÐAN FORMULADEILDIN - 24. JUNI

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. HB (m) | 14 | 8 | 2 | 4 | 35 -16 | 28 | 6 - 0 - 1 | 2 - 2 - 2 |
| 2. Skála | 14 | 7 | 5 | 2 | 29 -16 | 26 | 4 - 2 - 1 | 3 - 3 - 1 |
| 3. B36 | 13 | 7 | 5 | 1 | 18 - 6 | 26 | 4 - 3 - 1 | 3 - 2 -0 |
| 4. NSÍ | 13 | 5 | 5 | 3 | 20 -16 | 20 | 3 - 2 - 0 | 2 - 3 -3 |
| 5. EB/Str. | 13 | 4 | 5 | 4 | 14 -21 | 17 | 1 - 5 - 0 | 3 - 0 -4 |
| 6. KÍ | 13 | 4 | 2 | 7 | 20 -21 | 14 | 2 - 0 - 4 | 2 - 2 -3 |
| 7. GÍ | 13 | 4 | 1 | 8 | 17 -23 | 13 | 1 - 1 - 4 | 3 - 0 -4 |
| 8. ÍF | 13 | 3 | 4 | 6 | 16 -29 | 13 | 2 - 1 - 3 | 1 - 3 -3 |
| 9.TB (u) | 13 | 3 | 4 | 6 | 12 -20 | 13 | 2 - 2 - 1 | 1 - 2 -5 |
| 10.VB | 13 | 3 | 2 | 7 | 9 -21 | 11 | 2 - 1 - 5 | 1 - 1 -2 |

## LEIKARAHAGTØL FORMULADEILDIN 2005

| | Leikari | Min | D | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Allan Joensen | 1020 | 12 | 1 | - | - | - | -28 | 100 |
| 2 | Áki Petersen | [illegible] | [illegible] | 1 | - | - | - | 22 | - |
| 3 | Sverri Ellingsgaard | 7[illegible] | 1 | - | - | - | - | - | - |
| 5 | Poul Ennigarð | 1170 | 13 | - | - | 1 | - | 2 | 69 |
| 6 | Bartal Eliasen | 914 | 12 | - | 2 | 3 | - | - | 60 |
| 7 | Bárður á Lakjuni | [illegible] | [illegible] | - | 3 | - | - | - | - |
| 8 | Fritleif í Lambanum | 604 | 10 | 1 | 2 | 3 | - | - | 2 |
| 9 | Atli Petersen | 168 | [illegible] | - | 11 | - | - | 1 | 8 |
| 10 | Hanus Eliasen | 800 | 12 | 5 | 2 | - | - | - | 27 |
| 11 | Eyðolv Petersen | [illegible] | 11 | 1 | - | 2 | - | - | 131 |
| 12 | Gunnar Nielsen | 901 | 12 | 5 | 2 | 1 | - | 3 | 117 |
| 13 | Roy Róin | [illegible] | 1 | - | 1 | - | - | - | - |
| 16 | Emil Toftegaard | 51 | 1 | - | 1 | - | - | -1 | - |
| 17 | Høgni Zachariassen | 1170 | 13 | - | - | 1 | - | 2 | 43 |
| 18 | Rúni Eyðunsson [illegible] | 901 | 12 | 6 | - | 2 | - | 2 | 35 |
| 19 | Frank Poulsen | [illegible] | [illegible] | [illegible] | - | - | - | - | - |
| 20 | Sylla Amed Davy | 1017 | 11 | 6 | 1 | 1 | - | 2 | 60 |
| 21 | Jonn Sólheim Thomsen | [illegible] | 7 | 1 | - | 3 | - | - | 7 |
| 22 | Jákup Helgi Egholm | 90 | 1 | - | - | - | - | -3 | - |
| 28 | Magni á Lakjuni | [illegible] | [illegible] | 3 | 4 | - | - | 3 | 32 |
| 30 | Símun Eliasen | 1170 | 13 | - | - | 4 | - | 1 | 104 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir, Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur, Inn: Dystir innskiftur, G: Gul kort, R: Reyð kort, M: Mál, Stig: í kappingini ársins ÍF-ari*

**Aðrir dystir í Formuladeildini í dag - 14. umfar**
HB - Skála (spældur mikudagin 22. juni)
TB – EB/Streymur (spældur leygardagin 25. juni)
KÍ - VB (spældur í gjár)
NSÍ – GÍ (spældur í gjár)

**Dystir í Formuladeildini sunnudagin 03. juli – 15. umfar**
ÍF – KÍ (spældur leygardagin 2. juli kl. 19.00, á Varmakeldu)
Skála - NSÍ
GÍ - TB
B36 – EB/Streymur
VB - HB

**Dystir í 3. deild sunnudagin 26. juni – 9. umfar**
VB - ÍF
NSÍ – EB/Streymur
Skála - Fram
HB - SÍ
KÍ – B68

**Málskjúttar formuladeildin**

| | |
|---|---|
| Tór Ingar Akselsen, HB | 5 |
| Jónhard Fredriksberg, Skála | 5 |
| Súni Olsen, GÍ | 5 |
| Christian H. Jacobsen, NSÍ | 5 |
| Hans á Lag, HB | 4 |
| Bogi Gregersen, Skála | 4 |
| Rúni Nolsøe, HB | 4 |
| Óli Johannesen, TB | 4 |

**VERT AT VITA**
Hetta er aðru ferð, at árstalsfelagið úr Havn vitjar okkum í formuladeildini í ár. Fyrri dysturin, sum varð spældur sunnudagin 17. apríl, endaði við einum rímuliga tryggum 0-2 sigri til havnarmenn. Hetta varð samstundis týdningarmikla vendipunktið hjá B36, sum hevur við sær, at teir liggja í toppinum. -Síðani tá hava teir nevnliga ikki tapt í formuladeildini.

3.deild hjá okkum spældi í gjár ímóti botnliðnum VB í Fuglafirði. Av góðum orsøkum vita vit ikki úrslitið, men vóð einum sigri í gjár kunnu teir framvegis halda fast í toppinum. Dysturin í gjár var samstundis seinasti dystur hjá 3. deild áðrenn summarsteðgin, sum varir líka til 7. august.

# ÍTRÓTTARFELAG FUGLAFJARÐAR

## ÍF-LIÐIÐ

1. Allan Joensen
2. Áki Petersen
3. Sverri Ellingsgaard
5. Poul Ennigarð
6. Bartal Eliasen (liðsk.)
8. Fritleif í Lambanum
9. Atli Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R.-Petersen
12. Gunnar G. Nielsen
16. Tórður Thomsen
17. Høgni Zachariassen
18. Rúni Ey. Elttør
19. Frank Poulsen
20. Sylla Amed Davy
28. Magni á Lakjuni
30. Símun Eliasen

**Venjari:**
Petur Simonsen
**Hjálparvenjari:**
Sonni Jensen
**Liðleiðarar:**
Høgni á Lakjuni
Símun Fornagarð
**Fysioterapeut:**
Álvur Hansen

## B36-LIÐIÐ

1 Jákup Mikkelsen
2 Alex José dos Santos
3 Allan Mørkøre
4 Bogi Hermansen
5 Dánjal P Johansen
6 Ingi Højsted
8 Mikkjal Thomassen
9 Obele Okeke Onyebuchi
10 Fróði Benjaminsen
11 Levi Hanssen
13 Bárður H Joensen
14 Johan V Gunnarsson
15 Kenneth Jacobsen
16 Jóan Pauli Jacobsen
17 Thomas Hans Rubeksen
18 Eyðun Højgaard
19 Pól Thorsteinsson
20 Bergur Midjord
21 Magnus Poulsen
22 Klæmint Matras
24 Ásbjørn V Gunnarsson
28 Herbert í Lon Jacobsen

**Venjari**
Sigfríður Clementsen
**Hjálparvenjari**
Magni Mohr
**Liðleiðarar**
Dánjal P Johansen og Sjúrður Norðbúð

formuladeildin



**DAGFINN OLSEN**
**Dan og Edvard**

**SIGURÐ S. SIMONSEN**